## Roykjarabørn viga minni



Børn, hvørs mammur royktu, meðan tær gingu við teimum, viga minni við føðing enn tey, hvørs mammur ikki royktu. Tilsamans 118 av teimum 679 kvinnunum, ið áttu í 2008, hava upplýst, at tær vóru roykjarar. 514 kvinnur upplýstu, at tær ikki royktu. Í Heilsulýsing Landslæknans fyri 2008 er statistikkur yvir miðalvektina hjá børnum, sæð í samband við um móðurin roykir ella ikki. Tað vísir seg at meðalvektin hjá børnum, ið eru fødd av roykjandi mammum fyri alt landið var 3356 gramm, meðan meðalvektin hjá børnum, hvørs møður ikki vóru roykjarar, var 3695 gramm. Sostatt viga børn at roykjandi mammum í meðal 339 gramm minni enn børn at mammum, ið ikki royktu.

## Nøgdin av burturkasti minkar

Fyrra hálvár 2009 hevur IRF tikið ímóti 72.127 rúmmetrum av burturkasti. Hetta er ein minking upp á 7,5 prosent í mun til fyrra hálvár í 2008. Ein tann fyrsti vísarin, ið neyvt kann vísa fíggjarstøðuna hjá einstøku familjunum í landinum, er mongdin av burturkasti. At fólk eru vorðin meira sparin og ansa betri eftir, hvussu tey gagnnýta hvørja krónu best, sæst nú eisini aftur í mongdini av burturkasti, ið IRF tekur móti. Fyrra hálvár í ár er mongdin av burturkasti minkað við góðum 7,5 prosentum, samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Meginparturin av burturkastinum verður brendur, góð 77 prosent, meðan sløk 22 prosent verða send til endurvinning. Eitt gott prosent verður tyrvt.

# Ikki vána floksdisiplin



*Alfred Olsen heldur ikki, at floksdisiplinin í Sambandsflokkinum er vánalig. Tvørtur ímóti heldur hann, at positivur kritikkur er sunnur*

**- Sjálvandi er tað best, at flokkurin fer út sum ein maður í slíkum málum, men hinvegin er tað heldur ikki so, at nakar fær munnkurv, sigur Alfred Olsen, formaður Sambandsfloksins á tingi**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Alfred Olsen, formaður Sambandsfloksins á tingi, vísir aftur, at tingmanningin ikki hevur verið kunnað um samráðingarnar um sonevnda ólavsøkupakkan.

- Tingmanningin hevur verið við. Ein annar spurningur er so, nær man er nóg mikið við, men eg kenni ikki, at vit ikki hava verið við í tilgongdini, sigur Alfred Olsen.

Hann sigur, at Sambandsflokkurin alla tíðina hevur lagt dent á, at talan ikki er um ein kreppupakka, men um ein vakstrarpakka.

- Tingini kundu kanska havt verið gjørd eitt sindur ørvísi, men tað er nú, at tað stóra arbeiði byrjar. Vakstrarpakkin eru nakrar rammur, sum vit nú skulu útfylla við lógararbeiði og raðfestingum, sigur Alfred Olsen.

Hann sigur, at tað fyri tað mesta hava verið floksformenninir í samgonguflokkunum, sum hava arbeitt við sonevnda ólavsøkupakkanum, men heldur kortini ikki, at tingmanningin hevur veirð hildin uttan fyri.

- Íløgurnar vórðu jú hækkaðar 100 milliónir krónur, og tað er júst meiningin við vakstrarpakkanum. At spræna pening út í samfelagið til arbeiðsskapandi endamál. Nú verður tað so upp til okkum at finna út av og raðfesta, hvat peningurin skal brúkast til, sigur Alfred Olsen

### Floksdisiplin

Tað er eingin loyna, at bæði tingmenn úr Sambandsflokkinum og úr Javnaðarflokkinum hava verið úti alment og kritisera bæði ólavsøkupakkan og arbeiðsgongdina í sambandi við hann. Men formaður Sambandsfloksins á tingi heldur kortini ikki, at floksdisiplinin í Sambandsflokkinum er vánalig.

- Sjálvandi er altíð best, at ein flokkur er púra samdur í slíkum málum. Hinvegin hevur tað ongantíð verið sambandspolitikkur at geva tinglimum munnkurv, sigur Alfred Olsen.

Hann sigur, at man skal varða seg fyri at gera tingfólk til nikkudukkur, og at positivur kritikkur er góður.

- Fíggjarlógaruppskotið skal verða liðugt um mánaðarskiftið august/september, og tað gevur okkum ein mánað til politiska viðgerð av uppskotinum, sum skal leggjast fyri tingið 1. oktober. Og so fáa vit at vita, hvussu fíggjarlógaruppskotið fer at síggja út í mun til ólavsøkupakkan, sigur Alfred Olsen.

Hann hevur sostatt einki ímóti at úttala seg til miðlarnar og heldur tvørtur ímóti, at tað púra óvanligt í einari politiskari demokratiskari tilgongd, at geva sær sjálvum munnkurv, eins og flokkarnir hava gjørt í samband við viðgerðina av pensjónsmálunum.



# Formansskapur á vitjan

*Formansskapurin í Fólkatinginum, ytst til vinstru Thor Pedersen (V), síðani stjóri og varastjóri í Fólkatinginum, Holger K. Nielsen (SF) og Søren Espersen (DF)*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Danski formansskapurin í Fólkatinginum er á vitjan í Føroyum, men vegna vána floglíkindi mátti ein túrur til Suðuroyar í gjár avlýsast**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Árligi fundurin millum formansskapirnar í Fólkatinginum og Løgtinginum er í dag. Formansskapirnir settust við fundarborðið klokkan tíggju í morgun, og sambært formansskapinum í Løgtinginum er ikki nakað serligt mál fyri, bara tað vanliga.

Tað gekst annars rættiliga illa hjá fólkatingslimunum at lenda í Vágum í gjár. Eftir ætlan skuldi flogfarið seta seg um 11-tíðina, men tað regnaði so illa, at tó hjólini næstan vóru niðri at, setti flogskiparin ferð aftur á flogfarið, sum helt leiðina fram til Bergen.

Donsku gestirnir lendu tí ikki í Vágum fyrr enn um sekstíðina í gjárkvøldið.

Ætlanin var annars, at danska ferðalagið skuldi fara við tyrluni beinleiðis til Suðuroyar, har stór móttøka var fyriskipað í Sumba. Hendan ferðin mátti eyðvitað avlýsast.

Tríggir av teimum fimm fólkatingsformonnunum eru við á ferðini, og saman við teimum eru konur teirra umframt stjóri og varastjóri í Fólkatinginum og trý onnur embætisfólk.

Teir tríggir eru Thor Pedersen, formaður, Søren Espersen, 2. næstformaður og Holger K. Nielsen, 3. næstformaður.

Fólkatingsstjóri er Carsten U. Larsen og varastjóri er Per Anker Hansen. Embætisfólkini eru Søren Koushede, ráðgevi, Winnie Rutkjær, skrivari og Inge Stokholm, avgreiðsluskrivari.

Frúurnar hjá fólkatingsformonnunum vóru í býnum saman við frúunum hjá løgtingsformonnunum, meðan fundurin var, og seinnapartin verður vitjað á Fornminnissavninum, áðrenn løgtingsformansskapurin er vertur við ein døgurða í kvøld.

Fyrrapartin í morgin vitjar ferðalagið borgarstjóran í Havn, Heðin Mortensen, og løgmann, Kaj Leo Johannesen, áðrenn farið verður avstað aftur eftir miðdag.